Havbúnaðarfelagið
FAROESE FISH FARMERS

# AÐALFUNDUR HJÁ HAVBÚNAÐARFELAGNUM

2. juni 2022

— Ársfrágreiðing fyri 2021

# Frágreiðing frá nevndini

## Laksaaling

### Methøg framleiðsla og søla

Framleiðslan av laksi frá føroyska havbúnaðinum var í 2021 uml. 95 tús. tons í kruvdari vekt, sum er methøgt og væl hægri enn í 2020, tá ið uml. 73 tús. tons vórðu framleidd. Samlaða útflutningsvirðið av laksavørum var í 2021 uml. 4,5 mia. kr., sum er 1,2 mia kr. meira enn í 2020.

Eftirspurningurin eftir laksavørum ávirkaðist nógv av tiltøkunum kring heimin at basa COVID-19. Eftirspurningurin frá gistingarhúsum, matstovum og catering (horeca) minkaði í stórum, meðan eftirspurningurin frá handlum og sølumiðstøðum, sum selja til endabrúkaran, vaks. Okkurt bendir á, at so hvørt sum eftirspurningurin frá horeca segmentinum hevur tikið seg upp aftur, hevur eftirspurningurin frá endabrúkaranum í handlum hildið sær. Samlaði eftirspurningurin er tí øktur.

Serliga COVID-19 støðan ávirkaði geografisku spjaðingina av søluni í bæði 2020 og 2021. Eins og undanfarin ár fór uml. 96% av laksaútflutninginum til teir 4 høvuðsmarknaðirnar ES, USA, Russland og Kina. Men COVID-19 avleiðingar á marknaðunum saman við trupulleikum við flutningi til fjarskotnar marknaðir hevði við sær, at lutfalsliga størri partur varð útfluttur til ES enn vanligt hevur verið áðrenn COVID-19. Bæði í 2020 og 2021 lá sølan til ES um 45–48%, sum er ein stór øking í mun til undanfarin ár. Lutfalsliga minni hevur í 2020 og 2021 verið útflutt til Kina, meðan útflutningurin til USA og Russlands hevur hildið sær á nakað sama støði. Eftir russisku innrásina í Ukraina, er føroyski laksaútflutningurin til Russlands tó steðgaður upp.

### Útlitini fyri laksaútflutningin eru góð fyri 2022 og 2023

Greiningarfyritøkan Kontali metir, at heimsframleiðslan av laksi í fyrra hálvári 2022 væntandi lækkar uml. –5% í mun til í fjør. Tøkan økist væntandi aftur í seinna hálvári, so úrslitið fyri alt 2022 tilsamans verður ein lítil minking á –1%. Útlitini fyri laksaprísin í ár eru tí góð, hóast prísirnir væntandi lækka aftur í heyst frá tí sera høga støði teir hava verið á í fyrra hálvári.

Greiningarfyritøkan Kontali metir, at heimsútboðið í 2023 sannlíkt økist uml. 4% í mun til 2022, og er hetta meira í tráð við tær árligu økingar, sum vit hava sæð undanfarin ár. Hóast laksaprísurin komandi ár eisini kann væntast at verða lægri enn tað høga støðið vit hava sæð fyrra hálvár 2022, eru útlitini fyri komandi ári tó framvegis á góðari leið.

Tað er tó umráðandi at minnast til, at føroyskur havbúnaður er í harðari kapping við aðrar alitjóðir, og uppá longri sikt eru útlitini fyri føroyskari aling eisini tengd at, hvussu gongdin verður við aling á landi nærri teimum stóru marknaðunum s.s. USA og Kina. Stórar íløgur eru og verða gjørdar í landaling kring heimin í hesum árum, hóast gongdin higartil hevur verið eitt sindur misjøvn. Fæst aling í landanleggum fram til tøku at virka eftir ætlan, kann hetta fáa stóra ávirkan á marknaðin fyri laksavørur. Tí hevur tað stóran týdning, at karmarnir kring føroyska alivinnu eru kappingarførir.

## Marknaðaratgongd framvegis ein avbjóðing

Russiska innrásin í Ukraina og tørvurin á at gera skjótar broytingar í útflutninginum undirstrikar enn einaferð týdningin av, at myndugleikarnir raðfesta arbeiðið at fáa Føroyum betri marknaðaratgongd. Lukkutíð fyri føroyska laksaútflutningin minkaði samlaða útboðið av laksi í heiminum í fyrra hálvári 2022. Føroyskir laksaútflytarar høvdu tí góðar møguleikar at fáa selt laksin á øðrum marknaðum. Støðan kundi tó lættliga verið øðrvísi, og tá hevði støðan sannlíkt viðført lækkandi inntøkur fyri føroyska samfelagið.

Fríhandilsavtalur við vakstrarmarknaðir í Asia (serliga Kina og Suðurkorea) hava stóran týdning, meðan tørvur eisini er á veterinerum avtalum við Avstralia og Brasil fyri yvirhøvur at kunna selja føroyskar fiskavørur har. Eisini skal vísast á, at tað í fríhandilsavtaluni við ES er ein lág tollfrí kvota fyri ávísar virkaðar laksavørur, sum kann forða menningini av nýggjum víðarivirkaðum vørum úr laksi. Eisini er ein tollfrí kvota fyri fiskafóður, sum virkar forðandi. Somu forðingar eru víðariførdar í fríhandilsavtaluni við Stórabretland.

Marknaðaratgongdin hjá okkara kappingarneytum er sum heild munandi betri enn hjá føroyskum alifyritøkum, og talið á fríhandilsavtalum er munandi størri hjá øðrum alitjóðum. Sum dømi kann nevnast, at bæði Kili og Ísland hava tollfrælsi fyri sín laksaútflutning til Kina, og Noreg er komið langt í samráðingum um fríhandilsavtalu við Kina. Bæði Noreg og Ísland hava gjøgnum sín limaskap í EFTA atgongd til umleið 30 fríhandilsavtalur, sum fevna um omanfyri 40 lond (ikki íroknað ES). Eisini hava londini fleiri veterinerar avtalur, sum í nøkrum londum er ein fortreyt fyri yvirhøvur at kunna selja fiskavørur har. Føroyar hava hinvegin einans 6 fríhandilsavtalur, íroknað avtaluna við Stórabretland, sum fekk gildi 1. januar 2021.

## Nýggir alihættir krevja dagførdar karmar

Í Føroyum og fleiri staðni kring heimin verða royndir gjørdar við aling í lokaðum eindum og á opnum havi. Hóast íløgurnar eru stórar, eru møguleikarnir somuleiðis stórir, um tað fæst at bera til.

Tað hevur týdning, at tað ikki eru óneyðugar forðingar í lóggávuni fyri at alihættir kunnu mennast, og Havbúnaðarfelagið heldur tí, at lóggávan kring alingina í Føroyum eigur at verða dagførd í mun til broyting í alihættunum. Eitt nú er tørvur á at endurskoða, um øll krøvini í verandi rakstrarkunngerð eru viðkomandi, um alt verður í lokaðum eindum ella á opnum havi, og hvat annars kann gerast fyri at stuðla undir hesum royndum.

## Framleiðslan má vera burðardygg

Matvøruframleiðslan í heiminum er størsta kelda til umhvørvisárin og trýst á mørkini fyri, hvat náttúran megnar. Laksaaling er tó lutfalsliga væl burðardyggari enn flest aðrar protein framleiðslur. Fokus hjá føroyskum havbúnaði eigur áhaldandi at vera, at komandi ættarlið arva eina náttúru, sum er í betri standi, tá ið vit lata hana frá okkum, enn tá ið vit fingu hana at umsita.

Við at seta ein ábyrgdarfullan framferðarhátt í brennidepilin gera vit okkara til, í meiri ella minni mun, at røkka fleiri av heimsmálunum hjá ST fyri burðardyggari menning. ST hevur staðfest, at aling av fiskavørum hevur ein stóran leiklut í at nøkta tørvin á hágóðsku proteinum hjá vaksandi fólkatalinum á jørðini. Við at framleiða alilaks við atliti til tey 17 heimsmálini hjá ST, kann føroyskur havbúnaður gera sítt til, at hetta kann eydnast. Eitt nú kann føroyskur havbúnaður verða við til at framleiða matvørur til heimin við lítlari veðurlagsávirkan í mun til flest aðrar animalskar proteinframleiðslur.

Føroyska laksaalivinnan fær sum heild góð skoðsmál frá felagsskapum, sum meta um umhvørvisávirkanina frá ymiskum fiskavørum og geva endabrúkarunum tilmæli um, hvørjar fiskavørur tey skulu eta og úr hvørjum londum. Allar laksaalifyritøkur hava eina ella fleiri sertifiseringar.

## Sama tal á smolti sett á sjógv – men smoltini eru størri

Fyritøkurnar nýta framvegis týðandi part av úrslitinum til at gera íløgur í útbygging av smoltstøðum kring landi, nýggj tænastuskip og tól til ikki-medisinska lúsafyribyrging og -viðgerð. Íløgur í stórsmolt eru viðvirkandi til at minka um lívfrøðiliga váðan, og gera tað møguligt at økja um framleiðsluna við tað, at smoltini eru størri, áðrenn tey verða sett út í ringarnar á sjónum.

Í 2021 vórðu uml. 20,3 mió. laksasmolt sett út í Føroyum. Hetta er á leið tað sama sum í 2020, tá ið umleið 20,1 mió. smolt vórðu sett út. Miðal smoltvektin er økt seinastu árini, sum so eisini merkir, at hvørt einstakt smolt er styttri tíð á sjónum. Í 2014 var eitt smolt í miðal í sjónum í 18 mánaðir áðrenn tøku, meðan tað í 2021 var á sjónum í knappar 14 mánaðir áðrenn tøku.

Miðal smoltstøddin við útsetu øktist úr 372 g í 2020 upp í 425 g í miðal í 2021, og væntandi økist hon uppaftur meira komandi árini.

## Framvegis fleiri lívfrøðiligir váðar

Vinnan hevur framvegis ymsar lívfrøðiligar avbjóðingar. Tað hevur høga raðfesting at berjast ímóti lús og sjúkum, so sum hjartasjúkur (serliga CMS), táknusjúkur og sjúkuelvandi ILA.

Feløgini nýta fleiri ymsar hættir at halda lúsatalinum niðri. Umframt at framleiða alsamt størri smolt, sum styttir um tíðina í sjónum, nýta feløgini eisini m.a. rognkelsi, feskvatnsviðgerð, mekaniska avlúsing, lokaðar eindir og strategiska plasering av útsetingum. Laksaalarar hava nú í nøkur ár nýtt rognkelsi á flest øllum støðum til tess at fyribyrgja lús í aliringum. Royndirnar higartil vísa, at hetta í flestu førum hevur minkað um tørvin á øðrum viðgerðum. At nýta rognkelsi í sambandi við laksaaling er lutfalsliga nýtt, og avbjóðingarnar við at fáa tey at trívast eru eisini nýggjar. At arbeiða miðvíst við at tryggja teirra trivnað er av alstórum týdningi.

Framleiðsla av rognkelsum til alivinnuna er nýliga byrjað í Føroyum, partvíst í Nesvík og partvíst í Svínoy. Enn er framleiðslan ov lítil til at nøkta tørvin, tí er eisini neyðugt at innflyta rognkelsi.

Føroyar hava millum strangastu veterineru standardar í heiminum. Hesir umfata eina røð av krøvum so sum sjúkuviðgerð og fyribyrging, eftirlitið við lús og flutningi. Vit hava eitt vaksandi tal av serútbúnum djóralæknum, lívfrøðingum, umframt hjálparfólkum, sum øll arbeiða fyri betri djóraheilsu og trivnaði.

Føroyska alivinnan hevur síðan 2004 framleitt laks uttan at nýta antibiotika.

## Týdningarmikið við forútsigiligum karmum kring alivinnuna

Alivinnan er ein framleiðsluvinna, har tað krevur neyva planlegging og stýring at fáa eitt gott úrslit. Harumframt er alivinnan ein kapitaltung vinna, sum ger stórar íløgur á hvørjum ári. Undir slíkum umstøðum er tað av avgerandi týdningi, at alifyritøkurnar í góðari tíð kenna fortreytirnar fyri at virka, hvørji krøv myndugleikarnir seta, hvussu kunngerðir og reglur skulu tulkast, og hvørjar mannagongdir myndugleikarnir ætla at fylgja – sama er um ætlanin er at gera broyting í tulking av reglum ella broyting av mannagongdum.

Havbúnaðarfelagið heitir á myndugleikarnar um at hava hetta í huga, tá ið nýggjar reglur verða smíðaðar, og tá ið almennir eftirlitsmyndugleikar broyta praksis.

**Útbúgving, gransking og menning stóran týdning fyri føroyskan havbúnað**
Føroyskur havbúnaður er ein vitanartung vinna, og framleiðslan gerst alsamt meira samansett og krevjandi. Tað hevur tí týdning, at vit alsamt menna vitanina í og kring alivinnuna gjøgnum útbúgving, gransking og nýmenning.

Havbúnaðarfelagið hevur í farna ári luttikið aktivt í arbeiðsbólki, sum Yrkisútbúgvingarráðið setti at fyrireika yrkisútbúgving innan aling, og nú er loksins brostið fyri nev, og alaraútbúgvingin byrjar á heysti 2022 á miðnámi í Vestmanna.

Hóast verandi alarar eru dugnaligir, krevur tað alsamt størri vitan og førleikar at ala á landi og á sjónum. Avbjóðingarnar gerast ikki minni, um farið verður út á meira streymhørð øki ella opið hav at ala. Tørvur er tí á, at tey starvsfólk, sum byrja eina yrkisleið sum alarar, hava eitt gott ástøðiligt og praktiskt grundarlag, tá tey byrja at arbeiða í vinnuni. Samstundis hevur tað eisini týdning at kunna skjalprógvað førleikarnar hjá hesum starvsfólkum. Alifyritøkurnar hava bjóðað sær til at tryggjað eitt ávíst tal av læruplássum tey fyrstu árini, so útbúgvingin kann fáa eina góða byrjan.

Havbúnaðarfelagið hevur eisini í farna ári fíggjað tvær granskingarverkætlanir, sum P/F Fiskaaling fremur. Fyrra verkætlanin snýr seg um at kanna støðuna hjá føroyska sjósílastovninum, og hevur verkætlanin verið í gongd síðani 2018. Seinna verkætlanin snúði seg um at menna eina føroyska klassifiseringsskipan fyri botndjór. Skipanin skal brúkast til at meta um møgulig umhvørvisárin frá alingini, og verður eitt hent amboð afturat í amboðskassanum, at tryggja eina burðardygga nýtslu av alifirðunum. Henda verkætlan verður samfíggjað við Umhvørvisstovuni.

**Taraaling**
Taraaling er framvegis í menning í Føroyum, tó at føroyska taraalingin er frammaliga í altjóða høpi. Í løtuni eru tvey føroysk taraalifeløg.

Umleið 185 tons av tara í vátari vekt vórðu heystað og seld tilsamans í 2021. Tað er væl meira enn í 2020, tá uml 60–65 tons í vátari vekt vórðu heystað. Tað mesta varð útflutt til ES-lond, til matvøruframleiðslu (ingrediens- og liðugvøra) og til fóður. Eisini verður tari aldur til náttúrlig taraskjól til rognkelsi, at nýta í laksaalingini. Møguleikarnir fyri at kunna vaksa um framleiðsluna hava higartil verið avmarkaðir. Í desember í 2019 lýsti Heilsufrøðiliga Starvsstovan tó fimm aliloyvi til tara leys at søkja á útvaldum støðum. Aliloyvi eru útskrivað til aling av tara á Funningsfirði (út fyri Elduvík), á Gøtuvík og á Kaldbaksfirði, umframt loyvi til lívtaraaling í Fámjin. Væntað verður, at framleiðslan økist í ár í mun til 2021.

Um taraframleiðslan skal seljast til teir best gjaldandi altjóða marknaðirnar, er tó alneyðugt at møguleiki verður fyri at fáa atgongd til vistfrøðiligu sertifiseringina, sum verður nýtt í ES. Myndugleikarnir hava arbeitt eina tíð við hesum málinum, men enn er ikki komið á mál.

# Innihaldsyvirlit


Frágreiðing frá nevndini 2

1. Endamál Havbúnaðarfelagsins 7

2. Gongdin í føroyskum havbúnaði
2.1 Framleiðsla 8
2.2 Útseting av smolti 10
2.3 Útflutningur 10
2.4 Prísir 11
2.5 Býtið av útflutningi 14
2.6 Marknaðir 14
2.7 Vørusløg 15

3. Mál felagið hevur arbeitt við í árinum
3.1 Aliráðstevnan 17
3.2 Verkætlan at lýsa støðuna hjá sjósílastovninum 17
3.3 Nýggj klassifiseringsskipan fyri botndjór á føroyskum firðum 17
3.4 Útbúgving av starvsfólki til alivinnuna 18
3.5 Endurskoðan av umhvørvisgóðkenningum og vegleiðing 18
3.6 Brexit 18
3.7 Altjóða samstarv 19
3.8 Salmon from the Faroes 19

4. Lógir og kunngerðir
4.1 Broyting í lúsakunngerðini 20
4.2 Broyting í alilógini – tilbúgvingarætlan fyri slopnan alifisk 20
4.3 Uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd 21
4.4 Uppskot til kunngerð um burturkast 21

# 1. Endamál Havbúnaðarfelagsins

Havbúnaðarfelagið er vinnugreinafelag hjá føroyskum havbúnaði – bæði á sjógvi og á landi. Endamál felagsins er at fremja tey mál, ið eru av felags áhuga fyri limirnar. Uppgávan hjá felagnum er at menna vinnuna í samstarvi við einstøku limirnar, myndugleikar og stovnar, ið varða av føroyskum havbúnaði.

Felagið heldur til í Vinnuhúsinum og hevur felags umsiting við Føroya Arbeiðsgevarafelag og onnur vinnufeløg.

**Í nevndini í Havbúnaðarfelagnum sita:**
Regin Jacobsen, Bakkafrost
Atli Gregersen, Luna/Hiddenfjord
Hans Jákup Mikkelsen, MOWI Føroyar

# 2. Gongdin í føroyskum havbúnaði

## 2.1 Framleiðsla

### Laksur

Tøkan av laksi í 2021 var uml. 115 tús. tons í livandi vekt, sum er væl meira enn í 2020 og eisini væl meira enn metárið 2019. Tøkan í 2021 svarar til uml. 95 tús tons í kruvdari vekt. Í mynd 1 sæst annars, at framleiðslan í alivinnuni fyrstu árini aftaná kreppuárini øktist munandi, og síðani hevur árliga framleiðslan verið meira støðug fram til 2021, tá framleiðslan aftur vaks í stórum. Stóru íløgurnar í smoltstøðirnar á landi seinastu árini hava økt um smoltstøddina, og stytt um miðal framleiðslutíðina á sjónum. Við einari styttri framleiðslutíð á sjónum ber so eisini til at framleiða størri nøgdir av laksi tilsamans. Eins og undanfarin ár vórðu eingi síl tikin í 2021, og seinastu sílini verða nú tikin av.

**MYND 1**




| | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Síl | 5,482 | 7,648 | 9,000 | 8,800 | 2,382 | 0,000 | 0,000 | 0,960 | 0,000 | 0,000 | 0,000 | 0,000 | 0,000 | 0,000 | 0,000 |
| Laks | 22,31 | 38,85 | 51,50 | 45,41 | 60,49 | 76,80 | 75,85 | 86,48 | 80,62 | 85,82 | 86,83 | 78,97 | 94,99 | 88,96 | 115,6 |

Mynd 1. Tøka av laksi og sílum (rund vekt) 2007–2021
Kelda: Rúni Dam, sp/f Avrik

Mynd 2 vísir tøkuna av alifiski í kruvdari vekt viku fyri viku í 2021. Her sæst, hvussu tøkan av alifiski býtir seg yvir árið. Seinastu árini hevur nakað meira verið tikið út á heystið, men sum heild er tøkan býtt nokk so javnt út á árið. Tó verður minni tikið á hásumri og um ársskiftið.

Vikuliga tøkan av alifiski verður løgd út á heimasíðuna hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo.

**MYND 2**
Ár 2021




Mynd 2. Tøka av alifiski (tons kruvd vekt) viku fyri viku í 2021
Kelda: Havbúnaðarfelagið

## Tari

Tilsamans uml. 185 tons av tara í vátari vekt vórðu heystað og seld í 2021. Tað er væl meira enn í 2020, tá uml. 65–70 tons í vátari vekt vórðu heystað. Talan er um ymisk sløg av tara.

Tað mesta verður útflutt til ES-lond, til matvøruframleiðslu (granulat og liðugvøru) og til ískoytisfóður.

Eisini verður tari aldur til náttúrlig taraskjól til rognkelsi, at nýta í laksaalingini.

## 2.2 Útseting av smolti

Mynd 3 vísir útseting av laksi og sílum síðani aldarskiftið. Myndin vísir, at tað seinnu árini hevur verið ein vøkstur í talinum av útsettum smolti. Útsetingin í 2021 var umleið 20,3 mió. smolt, sum er nakað tað sama sum í 2020. Tað skal eisini havast í huga, at miðal smoltvektin er økt munandi seinastu árini, sum so eisini merkir, at hvørt einstakt smolt er styttri tíð á sjónum. Í 2014 var eitt smolt í miðal í sjónum í 18 mánaðir áðrenn tøku, meðan tað í 2021 var á sjónum í 14 mánaðir áðrenn tøku.

Miðal smoltstøddin við útsetu øktist úr 372 g í 2020 upp í 425 g í 2021. Miðal smoltvektin er seinastu fimm árini meira enn tvífaldað, og við teimum íløgum sum eru og verða gjørdar í smoltstøðir á landi, væntast miðal smoltvektin framhaldandi at økjast í komandi árum.

**MYND 3**

**Fiskur settur á sjógv**




| | ´02 | '03 | ´04 | ´05 | ´06 | ´07 | ´08 | ´09 | ´10 | '11 | ´12 | ´13 | 14 | ´15 | ´16 | ´17 | ´18 | ´19 | ´20 | ´21 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| mill stk | 20,7 | 8,7 | 2,9 | 4,7 | 9,2 | 9,5 | 8,7 | 11,2 | 14,5 | 12,1 | 15,0 | 13,7 | 14,7 | 15,9 | 16,0 | 14,5 | 16,9 | 17,2 | 20,1 | 20,3 |

Mynd 3. Útseting av smolti frá 2001 til 2021

Kelda: Rúni Dam, Sp/f Avrik

## 2.3 Útflutningur

Útflutningsvirðið av alilaksi var í 2021 uml. 4,5 mia. kr., sum er øking á meira enn eina milliard í mun til undanfarna ár. Tað skal tó havast í huga, at marknaðarstøðan var munandi trupulari í 2020 enn hon var í 2021, og tøkan í 2021 var væl størri. Eftirspurningurin eftir laksavørum ávirkaðist nógv av tiltøkunum kring heimin at basa COVID-19. Eftirspurningurin frá gistingarhúsum, matstovum og catering (horeca) minkaði í stórum, meðan eftirspuringurin frá handlum og supermarknaðum hinvegin vaks. So hvørt sum londini kring heimin hava linkað ella sett úr gildi strongu tiltøkini at tálma COVIS-19, er eftirspurningurin frá horeca-segmentinum tó økt aftur. Tiltøk eru tó framvegis í gildi kring heimin, og støðan er í ikki heilt normaliserað enn. Tá ið tað snýr seg um útflutning av alifiski, eru seinnu árini í roynd og veru talan um útflutning av laksi. Laksur er í dag størsta einstaka útflutn-

ingsvøran hjá Føroyum og stendur fyri uml. 48 % av samlaða virðinum av føroyska fiskavøruútflutninginum.

**MYND 4**




Mynd 4. Útflutningsvirðið av alifiski frá 2012 til 2021 (1000 kr.)
Kelda: Hagstova Føroya

## 2.4 Prísir

Marknaðarprísurin á laksi hevur bæði í 2020 og 2021 verið stórliga ávirkaður av COVID-19 støðuni kring heimin. Miðalprísurin á heilum, feskum føroyskum laksi var í fjør 47 DKK/kg, sum er 1 DKK/kg hægri enn í 2020, men framvegis væl lægri enn í 2019. Eftirspurningurin frá matstovum, gistingarhúsum og catering (horeca), minkaði í stórum tá COVID-19 tók seg upp kring heimin, og í staðin øktist eftirspurningurin frá retail-segmentinum, sum í størri mun eftirspyr virkaðar vørur, sum eitt nú portiónir og flak.

**MYND 5**




Mynd 5. Ársmiðal prísir á feskum kruvdum laksi (ársins prísir). FOB Føroyar
Kelda: Hagstova Føroya

Um sæð verður burtur frá tveimum seinastu árunum, tá ið serligar umstøður vóru, hevur prísurin seinnu árini hildið sær omanfyri 50 DKK/kg. Eisini prísurin á øðrum vørum s.s. portiónum hevur hildið sær væl, og tilsamans hevur hetta verið grundarlagið undir góðu gongdini í alivinnuni. Vanliga má roknast við, at ein hækkandi vinningur eisini førir til, at fleiri fyritøkur koma inn á marknaðin, og dríva prísin niður móti framleiðslukostnaðinum. Tað hevur tó víst seg at vera torført at vaksa um framleiðsluna líka skjótt sum eftirspurningurin økist. Orsøkin hevur serliga verið, at ikki nóg nógv nýggj aliøki eru tøk kring heimin, og at laksalúsin hevur gjørt tað torført at vaksa munandi um framleiðsluna á verandi aliøkjum.

Útlitini fyri marknaðarprísinum komandi árini eru tengd at gongdini í útboði og eftirspurningi. Uppá stutt sikt væntast prísurin í 2022 og 2023 at hækka aftur upp á tað støði vit hava sæð undanfarin ár. Orsøkin er serliga, at serligu COVID-19 tiltøkini so líðandi verða sett úr gildi aftur, og eftirspuningurin frá horeca-segmentinum tískil økist aftur. Eisini eru ábendingar um, at eftirspuningurin frá teimum nýggju retail-sølukanalunum, sum vórðu mentar undir COVID-19 halda sær rímiliga væl. Mett verður, at samlaða útboðið av laksi í heiminum minkar við –1% í 2022 í mun til 2021, og tí kann miðalprísurin fyri árið væntast at bliva heilt góður í 2022, tó at vit ikki kunnu vænta at síggja teir høgu prísirnar í fyrra hálvári 2022 halda sær í seinna hálvári eisini. Í 2023 økist útboðið av laksi í heiminum væntandi við uml. 4%, men tað er ikki størri øking enn at prísurin eisini komandi ár sannlíkt verður á góðari leið.

Sum frá líður verður prísurin eisini ávirkaður av, hvussu tað eydnast at minka um trupulleikan við laksalúsini, sum hevur verið ein avbjóðing um allan heim, og sum avmarkar vøksturin í útboðnum. Eisini kann tað ávirka útboðið, hvussu skjótt tað fer at ganga at menna aling á landi, har fiskurin verður aldur á alistøðum á landi heilt fram til tøku.

Miðalprísurin fyri frystar laksaportiónir var í 2021 uml. 91 DKK/kg, og prísurin hevur verið støðugur seinastu árini, eisini undir støðuni við COVID-19. Prísurin á laksaportiónum verður í stóran mun ásettur í langtíðarsáttmálum, og tískil er prísurin sum heild meira støðugur enn á øðrum laksavørum, tó at lækkaði laksaprísurin orsakað av COVID-19 tiltøkunum eisini sæst aftur í prísinum á portiónum.

**MYND 6**
**Laksaportiónir**




| | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| DKK/kg | 71,67 | 58,58 | 65,33 | 79,13 | 80,63 | 83,52 | 95,74 | 100,91 | 95,74 | 94,14 | 90,91 |

Mynd 6. Miðalprísur pr. kg av frystum laksaflaki (laksaportiónum) 2011–2021.
Kelda: Hagstova Føroya

## 2.5 Býtið av útflutningi

Mynd 7 vísir býtið av útflutninginum í virði frá 2014 til 2021. Hóast støðuna við COVID-19, var størsti parturin av útflutninginum framvegis heilur feskur laksur, sum í fjør hevði eitt útflutningsvirði á uml. 3 mia. kr. Meira varð útflutt av frystum vørum enn vanligt, og orsøkin er serliga ein øktur eftirspuringur frá retail-sektorinum, orsakað av COVID-19. Fólk hava í størri mun matgjørt heima við hús, heldur enn at fara á matstovu, og hetta sæst aftur í hagtølunum.

**MYND 7**




Mynd 7. Býtið av útflutningi av laksavørum 2011–2021
Kelda: Hagstova Føroya

## 2.6 Marknaðir

Seinastu tíggju árini er hend ein globalisering av føroyskum laksaútflutningi (mynd 8). Frá at hava útflutt 60 % til ES-marknaðin í 2011, minkaði tann lutfalsligi parturin, sum fer til ES, niður í 27 % í 2018, fyri síðani at kvinka upp aftur. Í 2020 og 2021 vaks lutfalsligi parturin til ES tó upp aftur á 45–48 %, m.a. tí tað orsakað av COVID-19 var torført at útflyta til meira fjarskotnar marknaðir sum USA og Kina.

Umframt ES hava tað seinnu árini serliga verið USA, EABS (Russland) og Kina, sum hava keypt føroyskan laks. Tilsamans fer uml. 96 % av laksaútflutninginum til hesar fýra marknaðirnar.

Útflutningurin til Kina er munandi øktur seinnu árini, men útflutningsparturin kavaði so aftur í 2020 og 2021, einamest orsakað av COVID-19 støðuni. Útflutningurin til USA og Russlands helt sær á nakað sama støði, um 20%.

Eftir at Rusland gjørdi innrás í Ukraina, er føroyski laksaútflutningurin til Russlands tó steðgaður, og neyðugt hevur verið at finna nýggjar keyparar og marknaðir. Útboðið av laksi í heiminum er tó minkað í fyrra hálvári 2022, og tað hevur gjørt tað lættari at finna nýggjar keyparar.

**MYND 8**

Útflutningsvirðið (%) á laksi 2011–21




Mynd 8. Býtið av laksaútflutningi á høvuðsmarknaðirnar 2011–2021
Kelda: Hagstova Føroya.

## 2.7 Vørusløg

Niðanfyri og á næstu síðu er eitt samlað yvirlit yvir útflutningsvirði, nøgd og prísir fyri ymsu vørurnar, sum laksaalivinnan framleiðir. Tølini eru fyri seinastu tíggju árini.

**TALVA 1**

| | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 1.283.654 | 1.720.921 | 1.971.084 | 1.955.213 | 2.741.263 | 2.781.094 | 2.831.989 | 3.079.375 | 2.025.914 | 3.043.807 |
| Frystur laksur | 40.018 | 45.235 | 23.257 | 34.902 | 8.390 | 30.731 | 18.798 | 24.448 | 21.859 | 75.950 |
| Laksaportiónir | 447.243 | 618.848 | 852.652 | 693.524 | 777.419 | 916.661 | 384.081 | 815.440 | 1.083.774 | 904.586 |
| Roykt laksaflak | 0 | 0 | 0 | 0 | 424 | 962 | 2.711 | 1.937 | 2.706 | 791 |
| Laksur, annað | 51.599 | 71.406 | 103.545 | 120.930 | 134.209 | 138.208 | 104.430 | 120.316 | 178.130 | 464.323 |
| Tilsamans | 1.822.514 | 2.456.409 | 2.950.538 | 2.804.570 | 3.661.704 | 3.867.656 | 3.342.009 | 4.041.516 | 3.312.383 | 4.489.457 |

Talva 1. Útflutningsvirðið fyri ymsu vørubólkarnar frá 2012 til 2021, tús. kr. *

**TALVA 2**

| | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Feskur laksur** | 45.098 | 42.312 | 47.588 | 45.454 | 49.854 | 50.340 | 53.562 | 58.461 | 44.316 | 64.490 |
| **Frystur laksur** | 1.483 | 1.204 | 611 | 983 | 194 | 560 | 376 | 515 | 450 | 1.704 |
| **Laksaportiónir** | 7.634 | 9.473 | 10.775 | 8.601 | 9.308 | 9.574 | 3.806 | 8.517 | 11.513 | 9.950 |
| **Roykt laksaflak** | 0 | 0 | 0 | 0 | 4 | 9 | 123** | 19 | 23 | 7 |
| **Laksur, annað** | 4.881 | 5.922 | 7.918 | 7.189 | 1.918 | 1.827 | 1.454 | 1.689 | 2.986 | 6.932 |
| **Tilsamans** | **59.096** | **58.912** | **66.891** | **62.227** | **61.277** | **62.310** | **59.321** | **69.202** | **59.288** | **83.082** |

Talva 2. Útflutningsnøgdin fyri ymsu vørurnar frá 2012 til 2021, tons *

**TALVA 3**

| | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Feskur laksur** | 28,46 | 40,67 | 41,42 | 43,02 | 54,99 | 55,25 | 52,87 | 52,67 | 45,72 | 47,20 |
| **Frystur laksur** | 26,99 | 37,56 | 38,07 | 35,50 | 43,18 | 54,89 | 49,97 | 47,43 | 48,63 | 44,57 |
| **Laksaportiónir** | 58,58 | 65,33 | 79,13 | 80,63 | 83,52 | 95,75 | 100,91 | 95,74 | 94,14 | 90,91 |
| **Roykt laksaflak** | N/A | N/A | N/A | N/A | 117,81 | 106,89 | 22,01** | 102,49 | 115,63 | 121,69 |
| **Laksur, annað** | 10,57 | 12,06 | 13,08 | 16,82 | 69,98 | 75,64 | 71,85 | 71,24 | 59,65 | 66,98 |
| **Tilsamans** | **30,84** | **41,70** | **44,11** | **45,07** | **59,76** | **62,07** | **56,34** | **58,40** | **55,87** | **54,04** |

Talva 3. Miðal útflutningsprísir fyri ymsu vørurnar frá 2012 til 2021, kr/kg. *
Kelda: Hagstova Føroya

* Orsakað av einari broyting í uppgerðarháttinum, kunnu tølini áðrenn 2016 ikki uttan víðari sammetast við tølini í 2016 og seinni.

** Feilur er í skrásetingunum hjá TAKS/Hagstovuni av royktum laksaflaki.

# 3. Mál felagið hevur arbeitt við í árinum

Her er ein stutt frágreiðing um nøkur mál, ið nevndin hevur arbeitt við seinasta árið.

### 3.1 Aliráðstevnan

Havbúnaðarfelagið hevur seinastu nógvu árini á hvørjum ári skipað fyri aliráðstevnu á Hotel Føroyum. Ráðstevnan er vorðin fastur táttur í virkseminum hjá Havbúnaðarfelagnum. Ætlanin við Aliráðstevnuni er serliga at førleikamenna og geva íblástur til starvsfólkið innan havbúnaðin, og at geva starvsfólkunum og fólki kring havbúnaðin møguleika at hittast og netverka.

Framløgurnar frá Aliráðstevnunum farnu árini eru at finna á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum www.industry.fo.

Tað eydnaðist akkurát at halda Aliráðstevnuna í 2020 áðrenn COVID-19 rakti, men Aliráðstevnan 2021, sum skuldi vera í mars 2021, varð avlýst vegna COVID-19.

Eisini Aliráðstevnan 2022, sum eftir ætlan skuldi vera 4. mars, mátti útsetast til 20. mai 2022 orsakað av COVID-19 støðuni í januar og februar.

### 3.2 Verkætlan at lýsa støðuna hjá sjósílastovninum

Havbúnaðarfelagið tók í 2018 stig til eina verkætlan, sum hevur til endamáls at lýsa støðuna hjá føroyska sjósílastovninum. Avtala er gjørd við P/F Fiskaaling um at útinna verkætlanina, og fevnir arbeiðið m.a. um at skráseta og kanna smoltið, sum fer á sjógv, og at kanna støðuna hjá vaksnum sjósílum á sjónum. Støða verður á hvørjum ári tikið til framhald av verkætlanini. Avtala er gjørd um framhald av verkætlanini í 2022.

### 3.3 Nýggj klassifiseringsskipan fyri botndjór á føroyskum firðum

Í sambandi við ætlanirnar um at dagføra umhvørvisgóðkenning og vegleiðing um umhvørviseftirlit við alivirksemi á sjónum, var komið eftir, at tørvur var á einari nýggjari klassifiseringsskipan fyri botndjór á føroysku firðunum.

Avtala varð gjørd við P/F Fiskaaling um at standa fyri verkætlanini, og Havbúnaðarfelagið og Umhvørvisstovan játtaðu fígging til verkætlanina. Ein stýrisbólkur varð settur fyri verkætlanina við umboðum fyri Umhvørvisstovuna, Havstovuna, Biofar og Havbúnaðarfelagið.

Verktælanin varð liðug í november 2021, og frágreiðingin *Benthic macrofauna classification system for Faroese fjords* kann finnast á www.fiskaaling.fo.

## 3.4 Útbúgving av starvsfólki til alivinnuna

Havbúnaðarfelagið hevur heitt á Yrkisútbúgvingarráðið um at seta á stovn eina yrkisútbúgving innan aling, og hevur Yrkisútbúgvingarráðið tikið væl ímóti áheitanini. Yrkisútbúgvingarráðið setti ein arbeiðsbólk at fyrireika útbúgvingina, Havbúnaðarfelagið luttók aktivt í arbeiðsbólkinum, saman við umboðum frá alifeløgunum og frá Yrkisdeplinum, sum hevði verkætlanarleiðsluna.

Løgtingið hevur nú játtað fígging til útbúgvingina, sum byrjar á heysti 2022 á miðnámi í Vestmanna. Ætlanin er at taka ein flokk inn um árið, og alifeløgini hava tryggjað læruplás til lærlingarnar fyrstu tíðina, so útbúgvingin kann fáa eina góða byrjan.

Útbúgvingin fer partvíst fram á miðnámi í Vestmanna og partvíst úti á læruplássinum hjá alifeløgunum.

## 3.5 Endurskoðan av umhvørvisgóðkenningum og vegleiðing

Umhvørvisstovan hevur tikið stig til at endurskoða vegleiðingina um umhvørviseftirlit við alivirksemi á sjónum, og hevur sett ein arbeiðsbólk við umboðum frá Umhvørvisstovuni, Fiskaaling, Biofar, Havbúnaðarfelagnum og einstøku alifeløgunum at endurskoða vegleiðingina.

## 3.6 Brexit

Brexit hevur haft og fer eisini frameftir at hava neiligar avleiðingar fyri føroyskan inn- og útflutning, hóast vit hava eina fríhandilsavtalu við Stóra Bretland, sum er meinlík avtaluni vit hava við ES. Sum dømi kann nevnast lágu tollfríu kvoturnar fyri útflutning av føroyskum laksafóðri til Stóra Bretlands, og at tað hevur verið trupult at útflutt fiskavørur umvegis Stóra Bretland, eitt nú til Írlands og Fraklands, og mannagongdirnar hava verið ógreiðar.

Havbúnaðarfelagið hevur haft dialog við myndugleikar í Føroyum og Stóra Bretlandi um teir trupulleikar, sum hava verið.

Bretska stjórnin ætlaði at tað í seinnu hálvu av 2022 skuldi koma í gildi krav um heilsuváttan fyri fiskavørur, sum verða útfluttar til Stóra Bretlands, og um at allar fiskavørur skuldi fara um eina BIP-støð í Stóra Bretlandi, tá tær koma til landið. Hesar ætlanir eru nú fyribils sleptar, meðan arbeitt verður við at snikka eina smidligari skipan í verk.

## 3.7 Altjóða samstarv

Havbúnaðarfelagið er limur í altjóða felagsskapunum ISFA (International Salmon Farmers Association). Fastir fundir eru hálvárliga, og luttekur Havbúnaðarfelagið á hesum fundum, í tann mun tað er praktiskt møguligt. Harumframt eru online fundir eftir tørvi.

## 3.8 Salmon from the Faroes

Felagið eigur og rekur heimasíðuna Salmon from the Faroe Islands (www.salmon.fo). Tað koma javnan fyrispurningar um føroyskan havbúnað gjøgnum hesa síðuna, bæði frá keyparum og frá endabrúkarum. Fyrispurningarnir kunnu í stórum býtast í tvey: Fyrispurningar um keyp av føroyskum laksi og fyrispurningar um, hvussu framleiðslan er skipað. Undir hesum síðsta eru eitt nú fyrispurningar um fóður, heilivágsnýtslu, ymisk úrslit frá yvirvøkuskipanum o.s.fr. Í hesum sambandi er tað ein stórur fyrimunur fyri føroyskan havbúnað at kunna vísa á, at einki antibiotika verður nýtt, og at fóðrið er non-GMO.

Farið er undir at dagføra hesa heimasíðuna.

# 4. Lógir og kunngerðir

Síðan seinasta aðalfund eru hesar lógir og kunngerðir, ið hava týdning fyri alivinnuna, settar í verk ella hava verið til viðgerðar:

### 4.1 Broyting í lúsakunngerðini

Uppskot um broytingar í lúsakunngerðini varð sent til ummælis hjá Havbúnaðarfelagnum í mai 2021.

Felagið tók undir við at gera hesar broytingar í kunngerðini:

- At generella lúsamarkvirðið verður 1,0.
- At eitt lægri lúsamarkvirði á 0,5 verður galdandi í tíðarskeiðnum 1. mai – 31. juli, tó í tíðarskeiðnum 1. juni – 31. juli í árinum kunngerðin kemur í gildi (2021).
- At um eitt alibrúk hevur tríggjar teljingar á rað, ella fýra teljingar tilsamans í útsetuni, sum eru farnar upp um markvirðið, sum ásett í kunngerðini, verður álagt at slakta fiskin (framskundað útslakt).
- At freistin fyri at fremja boð um framskundað útslakt verður sett til 2½ mánaða.

Omanfyri nevndu broytingar vórðu gjørdar í kunngerðini, tó at 2½ mánaði til framskundað útslakt varð ásett til 11 vikur.

Broytingarkunngerðin varð lýst sum kunngerð nr. 93 frá 3. juni 2021.

### 4.2 Broyting í alilógini – tilbúgvingarætlan fyri slopnan alifisk

Á sumri 2018 var ein óvanlig støða, við stórum nøgdum av laksi í Leyná, sum varð hildin at vera sloppin alilaksur. Hóast tað var ógreitt hvaðani laksurin stavaði, samstarvaðu alifeløgini við hjálp frá sílaveiðiufelagnum um at fáa laksin úr ánni og burturbeindan, í samráð við Landsdjóralæknan og Umhvørvis- og Vinnumálaráðið.

Støðan gjørdi tó greitt, at tørvur var á einari tilbúgvingarætlan fyri slíkar støður, og at tørvur eisini var á lógarbroytingum, so tað ber til skjótari at fara undir at taka fiskin úr ánni, um ein líknandi støða skuldi íkomið.

Havbúnaðarfelagið gjørdi stutt eftir hendingina eina tilbúgvingarætlan fyri slíkar støður, har tað ikki ber til at staðfesta, úr hvørjum alibrúki slopni laksurin stavar.

Umhvørvis- og Vinnumálaráðið smíðaði eisini í farna ári lógaruppskot, hvørs endamál var at gera tað lættari og skjótari hjá persónum, sum landsdjóralæknin hevur góðkent, at fara í ánna at taka slopnan alilaks, um landsdjóralæknin staðfestir at tað er neyðugt at taka laksin. Eisini verður ein skylda áløgd alifeløgunum at taka aftur slopnan alifisk í áum, eftir avgerð landsdjóralæknans og sambært tilbúgvingarætlan. Um tað kann staðfestast frá hvørjum alifelagi slopni alifiskurin stavar, rindar alifelagið fyri kostnaðin av at taka slopna fiskin aftur. Um tað ikki kann staðfestast, rinda feløg, sum hava laksaaliloyvi á sjónum kostnaðin í felag, sambært nærri avtalu ella kunngerð.

Havbúnaðarfelagið hevði onkrar viðmerkingar til lógaruppskotið, men tók annars undir við at tað verður lættari og skjótari at fara í ánna at taka slopnan alilaks, um ein líknandi støða skuldi íkomið.

Lógin er samtykt og lýst sum løgtingslóg nr. 27 frá 11. mars 2022.

## 4.3 Uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd

Uppskot til nýggja náttúruverndarlóg varð send til hoyringar á heysti 2021.

Havbúnaðarfelagið fegnaðist í hoyringssvarinum um, at ætlanin var at taka stig til at dagføra føroysku náttúruverndina. Viðmerkt varð, at alt menniskjaligt virksemi hevur møguleika fyri at ávirka náttúruna, men tað er umráðandi, at ávirkanin er burðardygg, eisini yvir tíð. Ein ábyrgdarfull gagnnýtsla av náttúruni er neyðug fyri at vit framhaldandi skulu kunna liva í og av náttúruni í Føroyum. Felagið hevði annars onkrar ítøkiligar viðmerkingar til uppskotið.
Uppskotið varð ikki samtykt áðrenn tingestan 2021–22 endaði, og datt sostatt burtur.

## 4.4 Uppskot til kunngerð um burturkast

Uppskot til nýggja kunngerð um burturkast er send Havbúnaðarfelagnum til hoyringar. Talan er um víðfevndar broytingar í mun til verandi kunngerð. Havbúnaðarfelagið hevur í juni 2022 sent inn ummælisskriv.